# Byggja nú út fyri 25 milliónir á Havsbrún

*Hetta er eitt tungt tak, men tað er neyðugt fyri at fylgja við kappingini, sigur stjórin á Havsbrún*

ÁKI BERTHOLDSEN

– Hetta verður eitt ódnartak.

– Men skulu vit gera okkum vónir um at fylgja við, er onki at gera, uttan at fylgja við.

Og fylgja við, tað royna tey í hvussu so er á Havsbrún í Fuglafirði.

Tí nú fer Havsbrún aftur at byggja út.

Og tað er ikki hissini útbygging, tí tað, sum skal gerast, fer at kosta um 25 milliónir.

Og tað verður borið skjótt at. Tí allar útbyggingarnar, sum ætlanin er at fara undir nú, skulu verða lidnar longu í heyst.

Bergur Poulsen, stjóri á virkinum í Fuglafirði, sigur, at hetta er størsta, einstaka íløga hjá Havsbrún í mong ár.

Men hann sigur, at kappingin á fóðurmarknaðinum so er so mikið hørð nú, at skal Havsbrún yvirhøvur gera sær vónir um at fylgja við, og varðveita kappingarførið, er tað eisini neyðugt at fylgja við menningini.

Og einasti máti at fylgja við uppá, tað er at gera íløgur.

Samstundis er fóðurframleiðslan hjá Havsbrún alsamt vaksin tey seinastu árini í samsvari við vøksturin í alivinnuni.

Harafturat kemur Havsbrún eisini meiri og meiri fyri seg á útlendska marknaðinum, so útflutningurin veksur eisini alsamt, helst til alivinnuna í Hetlandi og í Skotlandi.



*Tað eru ikki nógv virkið á landi, sum hætta sær undir eina íløgu uppá 25 milliónir krónur. Men tað fer Havsbrún í Fuglafirði undir nú, og arbeiðið skal vera liðugt longu í heyst.*

– So alt í alt er tað neyðugt at vit fara undir hetta takið nú, sigur Bergur Poulsen.

Havsbrún hevur nú søkt um tey neyðugu loyvini til at fara undir hesar útbyggingarnar, og so skjótt, sum tey eru fingin til vega, verður farið í gongd við arbeiðið.

**Goymslir og hallir**

Íløgan, sum Havsbrún fer at gera nú, er í fleiri pørtum.

Í fyrstu atløgu er ætlanin at gera eina nýggja goymslu til fóðurdeildina.

Goymslan, sum tey hava nú, er alt ov lítil og hartil alt ov óarbeiðslig.

Tann nýggja goymslan verður 1.700 fermetrar.

Men hon verður hartil nógv betri innrættað og betri útgjørd í allar mátar.

Harafturat skal ein nýggj blandingar- og silohøll gerast niðanfyri fóðurdeildina, tí eisini á tí økinum, er orkan ov lítil.

Silohøllin er staðið, har tað verður tikið ímóti rávøruni til fóðurið, tvs, fiskamjøli, bindievni, hveiti o.a.

Og í blandingarhøllini verður tað so blandað til fóður.

Í fóðrinum er 50% fiskamjøl, 30% er lýsi og 20% av bindievni, vitaminum og ørðum evnum.

Tann nýggja goymslan kemur at standa undir liðini á fóðurdeildini. Men ætlanin er, at kommunan skal útvega meiri øki, so at hon kann byggjast størri, tá ið økið er tókt.

„Tjaldið", ið eisini er ein goymsla, sum í løtuni stendur niðanfyri fóðurdeildina, skal flytast á økið norðuri á Enninum.

Og harafturat fer Havsbrún at útvega sær ein nýggjan, nýmótans, fjarstýrdan krana at landa bátarnar við, og tað fer eisini at lætta munandi um arbeiðsgongdina.

Bergur Poulsen sigur, at bátarnir, sum eru nú, eru so nógv størri, enn teir vóru fyrr, so at kranin, sum tey hava havt nú í nógv ár, er blivin ov stuttur.

**Betri umstøður og sparing**

Umframt at fáa betri pláss og at skapa betri umstøður, hava allar hesar íløgurnar eisini til endamáls at spara, tí av tí, at tað verður nógv arbeiðsligari á virkinum, fer tað at bera til at umseta nógv meiri framleiðslu, uttan at økja talið á arbeiðsfólki.

Ikki minst fara um- og útbyggingarnar at føra við sær, at tað verður munandi minni flutningur, enn tað er nú, bæði av rávøru og av lidnari vøru, og tað fer at spara rættiliga fitt av pengum, sigur Bergur Olsen.

**Øgiliga stórar nøgdir**

Hann sigur, at at alt hetta kann ljóða ógvusligt.

–Men vit skulu eisini hava í huga, at tað eru sera stórar nøgdir, sum fara ígjøgnum maskinaríið hjá Havsbrún, so tað er eisini neyðugt við nógvum plássi og góðum umstøðum.

Hann sigur, at á Havsbrún gera tey eini 40.000 tons av fóðuri um árið, umframt 35.000 tons av mjøli, og tað krevur sítt pláss, umframt at tað er rættiliga nógvur flutningur.

Tað arbeiða eini 100 fólk á Havsbrún.

# Signar á Brúnni flutti lønirnar hóast Karsten Hansen bað hann lata vera

*– Eg skilti hetta ikki sum eini harraboð frá Karsten Hansen Og eg flutti læraralønirnar fyri ikki at darva samráðingunum, sigur Signar á Brúnni*

ÁKI BERTHOLDSEN

– Eg havi gjørt eftir míni bestu dannføring. Og eg helt at tað var skeivt at steðga læraralønunum.

Um vikuskiftið syrgdi Signar á Brúnni, landsstýrismaður fyri, at lærararnir fingui lønina sum vant.

Annars var tað ikki ætlanin, at teir skuldu fáa lønina hesuferð. Lærarafelagið og fíggjardeildini samráðast um nýggjan sáttmála og í tí sambandi hava lærararnir boðað frá verkfalli frá 1. mars at rokna, um ongin sáttmáli er komin tá.

Og av tí, at teir sáttmálasettu lærararnir fáa lønina frammanundan, teir arbeiða, heitti Karsten Hansen, landsstýrismaður í fíggjarmálum, á Signar á Brúnni, landsstýrismann í skúlamálum um at halda mars-lønini aftur, nú verkfalshóttan varð fráboðað.

Men tað vakti ans, tá ið Signar á Brúnni ikki vildi fylgja hesi áheitanini frá partamanninum í glasborgini á Argjum, men flutti lærarałønirnar kortini sum vanligt.



*Signar á Brúnni er ósamdur við Karsten Hansen um, hvussu farast skal fram ímóti lærarunum*

Signar á Brúnni sigur, at hann hevur fylgt síni sannføring í hesum sambandi.

Og hann uppfataði heldur ikki áheitanini frá fíggjarmálaráðharranum sum eini harraboð.

– Eg haldi ikki, at tað er rætt at steðga lønini frammanundan.

– Eg haldi, at málið skal sleppa at ganga sína gongd.

– Og verður tað verkfall, ber tað altíð til at finna útav lønini aftaná, sigur Signar á Brúnni.

Hann sigur, at tað hevði verið óvanligt at steðga lønini frammanundan og tí valdi hann ikki at fylgja áheitanini frá Karsten Hansen.

*–Men er tað heppið, at tvey stýrið hava ymsa uppfatan av, hvussu farast skal fram?*

– Eg veit ikki, um uppfatanin er ymisk. Vit fingu eina sakliga áheitan frá fíggjarmálastýrinum.

– Men eg helt, at tað var skeivt at steðga lønini útfrá tí, at tað møguliga verður verkfall. Og nú semingsmenn eru komnir upp í, hava teir heimild at útseta eitt møguligt verkfall í eina viku.

Tað helvur ljóðað, at Karsten Hansen hevur tikið partamanni sínum tað rættiliga illa upp, at hann flutti lønirnar

Men tað veit Signar á Brúnni onki um.

–Eg valdi bara at arbeiða útfrá míni sannføring. Og eg haldi heldur ikki, at tað hevði verið fremjandi fyri samráðingarstøðuna at steðga lønini frammaundan.

– Tað hevði bara darvað samráðingunum, og tað helt eg ikki, at eg kundi.

Tí varð lønin flutt fyri at í hvussu so er tað ikki skuldi forða fyri eini semju, sigur Signar á Brúnni.





*Hesi húsini í Hvalba hevur kommunan keypt til eitt eldrasambýli og miðað verður eftir, at tað skal verða liðugt tíðliga í summar. Kommunan hevur leingi arbeitt við ætlanini, men nú er so komið undir land.*

# Tey eldru í Hvalba fáa nú betri sømdir

*Hvalbiar kommuna ætlar at lata eldrasambýli upp í summar. Fyrst skulu ábøtur gerast á húsini, sum kommunan hevur keypt til endamálið*

ÁKI BERTHOLDSEN

Hvalbiar Kommuna er farið undir eitt tiltak, sum verður eitt stórt framstig hjá teimum eldru í kommununi, og teimum, sum vara av teimum.

Einaferð tíðliga í summar er nevniliga ætlanin, at eitt eldrasambýli skal lata upp í Hvalba.

Tað er nú nakað síðani, at kommunan keypti húsini hjá Johan Eli og Margit Lisberg í Hvalba við tí fyri eyga at gera tað til eitt eldrasambýli.

Levi Niclasen, bygdaráðsformaður, sigur, at áðrenn húsini verða tikið í brúk til eldrasambýli, skulu ymsar ábøtur og broytingar gerast eftir krøvum frá myndugleikunum.

Farið verður undir tað arbeiði nú.

Og Levi Niclasen sigur, at ætlanin er at bera so mikið skjótt í bandi, at sambýlið kann lata upp tíðliga í summar, kanska einaferð í mei mánaði,ella 1. juni.

Tað, sum skal gerast við húsini, er í høvuðsheitum, at kjallarin skal innrættast, umframt at ein lyfta skal gerast. Annars skulu aðrar ábøtur gerast, eitt nú skulu onkur kømur leggjast saman o.s.fr.

Levi Niclasen heldur eisini, at hetta er ein hampiliga bílig íløga fyri kommununa.

Húsini, sum eru sera væl egnað til endamálið, vórðu keypt fyri eina millión.

Men kommunan fær helvtina av keypsprísinum aftur úr landskassanum.

Uvælingarnar og ábøturnar fara at liggja um 300-350.000 krónur.

So tilsamans fer hetta tiltakið at kosta kommununi ímillum 800 og 850.000 krónur.

Bygdaráðsformaðurin sigur, at eitt, sum ger húsini sera væl egnað til sambýli, er, at tey eru upprunaliga bygt við tí endamálið at hava krambúð í kjallaranum og tí eru tey bygt breiðari enn vanlig sethús.

**Á veg í fleiri ár**

Í sambýlinum verða 10 pláss. Ætlanin er at hava átta búpláss og tvey umlættingarpláss.

Tað hevur í fleiri ár verið eitt stórt ynski hjá heimarøktini at fáa eitt eldrasambýli í Hvalbiar Kommunu,

Umframt Hvalba, fevnir er eisini Sandvík í kommununi.

Kommunan hevur eisini arbeitt við málinum leingi.

Eitt drúgt skifti var ætlanin, at finna eina felags loysn saman við Tvøroyrar Kommuna.

– Men tað bleiv ongantíð til meiri enn prát og tí mátti kommunan taka síni egnu stig fyri at fáa gongd á, sigur Levi Niclasen.

**Eitt stórt framstig**

Hetta er eitt sera stórt framstig fyri tey eldru í kommununi.

Heimahjálpin sigur, at tað eru fleiri eldri í kommununi, sum eru búgva einsamøll og sum tí kenna seg reiðiliga ótrygg, serliga um næturnar.

Nú skal so ein upptøkunevnd veljast við umboðum fyri heimarøktina, heimasjúkrasystraskipanina, kommunulæknarnar og kommununa.

Tað verður heimarøktin, sum kemur at standa fyri arbeiðnum og sum kemur at arbeiða á sambýlinum um dagin.

Men Levi Niclasen sigur, at náttarvaktirnar, er ein útreiðslan, sum kommunan sjálv betalir.

## Eita nú Merko Føroyar

Í hesum døgum verða skiltir skift út og vindeygu verða dekorerað av nýggjum í fleiri krambúðum kring landið. Talan er um ellivu krambúðir í Porkeri, Havnini, Vestmanna, Miðvági, Sørvági, Toftum og í Klaksvík.

At krambúðirnar nú so at siga verða endurnýggjaðar kemst av, at tær skifta navn.Teir ellivu handlarnir fóru undir samstarv í januar 1995. Seinni fóru teir at marknaðarføra seg undir navninum fd handlarnir. Nú broyta teir til Merko handlarnir.

Høvuðsveitari av vørum til hesar handlarnar er Edcka í Danmark. Saman við trimum øðrum krambúðum verða Merko handlarnir í framtíðini einsamallir um vørumerkið Super. Hetta vørumerkið fevnir um matvørur og aðrar húsarhaldsvørur. Super vørurnar verða at fáa sum lágprísvørur hvønn dag.

Merko handlarnir siga, at ein fyrimunur í samstarvinum teirra millum er millum annað, at marknaðarføringin er minni kostnaðarmikil, enn hon hevði verið, um hvør einstakur handil skuldi staðið fyri hesum. Ein annar fyrimunur er, at vørurnar fáast bíligari, enn tær annars høvdu fingist.

Merko handlarnir brúka lýsingarblaðið Framfýsni. Blaðið kemur út eina ferð um mánaðin. Umframt Merko handlarnar er tað ætlanin, at aðrar krambúðir kring landið skulu lýsa í blaðnum. Ætlanin er eisini at hava nakað av redaktionellum tilfari í blaðnum, verður sagt í tíðindaskrivi.

# Partur skal bjóðast út alment

*Fleiri almennir stovnar hava valt at seta starvsfólk, ístaðin fyri at keypa tænastu frá privatum fyritøkum. Vinnuhúsið metir ikki at sammetingargrundarlagið er satt*

ÓLAVUR Í BEITI

Í sambandi við nógva tosið seinastu tíðina um at privatisera og útlisitera, hevur Vinnuhúsið eisini gjørt sína viðmerking til malini í seinasta tíðindaskrivinum.

Vinnuhúaisð skrivar, at fleiri almennir stovnar hava valt at seta starvsfólk í starv, í staðin fyri at keypa tænastu frá privatum fyritøkum. Hetta er galdandi innanfyri fleiri vinnugreinir, til dømis: Almennir stovnar velja at seta teldufólk í staðin fyri at keypa tænastuna frá einari privatari fyritøku, almennir stovnar velja at seta fulltrúar og ráðgevarar í starv í staðin fyri at keypa ráðgeving frá privatum ráðgevaravirkjum, og almennir stovnar velja at seta handverkarar í starv í staðin fyri at bjóða arbeiðið út ímillum privatir entreprenørar.

**MVG**

– Í fleiri ár hevur verið ført fram, at mvg'ið hevur forða almennum aðalstýrum og stovnum í at keypa tænastur frá privatum virkum, tí at aðalstýri og almennir stovnar ikki hava fingið mvg'ið endurrindað. Hesi viðurskifti er broytt frá 1. januar í ár, men her manglar ein kunning um tey broyttu viðurskiftini.

– Men hetta er tó ikki so einfalt, skrivar Vinnuhúsið. Tá ið ein privat fyritøka bjóðar uppá eina tænastu, er hon noydd at taka umsitingarútreiðslur, kapitalkostnað, inntøkur v.m. við í prísin, umframt løn til starvsfólk. Ein kostnaðarmeting verður gjørd út frá hesum.

– Tað eru viðurskifti, sum benda á, at almennir myndugleikar bara taka lønarkostnaðin av starvsfólkinum við, tá ið samanlíknað verður við prísin hjá tí privata, og tá sigur tað seg sjálvt, at roknistykkið hjá tí almenna verður bíligari.

**Hava servitan**

– Men hetta er ein skeiv samanbering. Almennir myndugleikar eiga at taka umsitingarútreiðslur, hølisútreiðslur við meira við, tá ið samanlíkað verður, tí aðalstýri og almennir stovnar rinda fyri hesar útreiðslur. Kostnaðarmetingin byggir í alt ov lítlan mun á, hvat vøran ella tænastan í veruleikanum kostar tí almenna at framleiða. Tað hava verið nógv dømi seinastu tíðina, har almennir stovnar hava valt at seta starvsfólk í starv í staðin fyri at nýta privatar fyritøkur, sum ofta hava eina servitan á økinum.

– Fyri at bøta um hesi viðurskifti og broyta hugsunarháttin hjá fólki, kundi tað í eini skiftingartíð verið eitt krav til aðalstýri og stovnar, at ein partur av uppgávunum skal bjóðast út alment. Ein verulig kostnaðarmeting eigur síðani at vísa, um privat feløg eru før fyri at kappast við aðalstýrið og stovnar, skrivar Vinnuhúsið.

## Skifta brúkilig flogfør út

Danska verjan fer nú at skifta fýra flutningsflogfør út, sum kundu havt flogið í 10 ár afturat.

Íløgan í nýggju flogførini fer at kosta 1,8 milliardir krónur.

Onkur av teimum, sum hava tikið undir við íløgunum, halda seg ikki hava fingið allar upplýsingar í málinum, og ivi verður sáddur um tað rætt at skifta flogførini júst nú.

Í august mánaði í 1997 mettu serfrøðingar hjá verjuni, at Hercules flogførini kundu flúgva til ár 2010 uttan trupulleikar.

Avgerðin um at keypa fýra nýggj flogflog varð tikin í mai mánaði í fjør.

Enn er ikki komið fram, hvør skal lata nýggju flogførini, men tað sigst at bretska Lockheedverksmiðjan skal lata tey.